# LÓG
# MEGINFELAG ÁHUGALEIKARA FØROYA

§ 1.

Navn felagsins er Meginfelag áhugaleikara Føroya, ið verður stytt til MáF. Heimstaður felagsins er Tórshavn.

§ 2.

Endamál felagsins er at stuðla og menna áhugaleiklistina í Føroyum. Hetta verður tilskilað í eini reglugerð.

§ 3.

Limir í MáF eru:

Sjónleikarafeløg, leikbólkar og einstaklingar.

Umbøn um upptøku skal vera skrivlig. Hon verður viðgjørd umsitingarliga og løgd til avgerðar á fyrsta nevndarfundi eftir umbønina. At siga seg burtur úr MáF skal verða skrivligt og fær gildi frá og við komandi ári.

§ 4.

Í nevnd felagsins verða valdir 5 limir. Nevndarlimir verða valdir annaðhvørt ár 2 og annaðhvørt ár 3. Nevndin skipar seg sjálv við formanni, næstformanni og kassameistara. Eisini verða hvørt ár valdir 2 varalimir. Formaðurin boðar til nevndarfundar. Fundurin er viðtøkuførur, tá minst 3 nevndarlimir eru á fundi.

Nevndin velur umboð í Leiklistaráðið. Valda umboðið hjá MáF í Leiklistaráðnum skal vera nevndarlimur í MáF. Umboðið kann ikki starvast sum umsitingarleiðari í MáF.

§ 5.

Nevndin setur umsitingarleiðara í MáF. Umsitingarleiðarin hevur um hendi dagligu leiðslu felagsins og skal arbeiða í samsvari við 2. § í hesi lóg og reglugerð sambært lógini. Umsitingarleiðarin arbeiðir við ábyrgd yvir fyri nevndini í MáF.

§ 6.

Roknskaparár felagsins er álmanakkaárið. Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum grannskoðara og er honum í hendi minst 8 vikur fyri aðalfundin. Roknskapurin verður lagdur fyri nevndina á seinasta nevndarfundi fyri aðalfundin.

§ 7.

MáF verður fíggjað við:

1. Almennum stuðuli
2. Limagjaldi
3. Tænastugjøldum
4. Stuðuli frá mentanargrunnum og stovnum
5. Veitingum frá stuðlum

§ 8.

Feløg og bólkar skulu í seinasta lagi 1. februar senda MáF frágreiðing um virki sítt í farna ári. Til frágreiðingar verða gjørd serlig oyðubløð. Frágreiðingin skal vísa alt, sum avrikað er í árinum, tal á sýningum, sýningarstað/-støð og annað, sum er av áhuga. Við frágreiðingini verður latin limalisti.

Tey, sum hava fingið fíggjarligan stuðul frá MáF, skulu lata felagnum roknskap og frágreiðing fyri hvørt verkevnið sær.

§ 9.

Aðalfundur felagsins er um grækarismessu. Nevndin ger av fundartíð og -stað og boðar til fundar í seinasta lagi ein mánað fyri fundin.

Allir limir í MáF kunnu møta á aðalfundi. Á aðalfundi hava sjónleikarafeløg 6 atkvøður, bólkar 2 atkvøður, og einstaklingar hava 1 atkvøðu. Bert tey, ið eru møtt, hava rætt at atkvøða við einari atkvøðu sær. Uppskot frá limunum til nevndarval verður latið MáF í seinasta lagi 14 dagar fyri aðalfundin, og sendir MáF síðan uppskotini út saman við skránni í seinasta lagi 8 dagar fyri aðalfundin. Allir limir í MáF, sum hava fylt 18 ár, kunnu vera í uppskoti til nevndarval.

Aðalfundurin ásetur limagjaldið.

Fundarskráin á aðalfundi er:

1. Aðalfundurin verður settur og fundarstjóri og -skrivari valdir.
2. Formansfrágreiðing.
3. Kassameistarin leggur roknskapin fram.
4. Umrøða/góðkenning av formansfrágreiðing og roknskapi.
5. Innkomin mál.
6. Áseta limagjald.
7. Velja nevndarlimir og varalimir.
8. Velja grannskoðara.
9. Ymist.

Har annað ikki er nevnt, ræður vanligur meiriluti á aðalfundi. Tá ið trý feløg ella 5 bólkar/einstaklingar ynskja tað, boðar umsitingarleiðarin í samráð við nevndina til eykaaðalfundar. Boðast skal til eykaaðalfundar við lýstari dagsskrá við 14 daga freist.

Aðalfundur og eykaaðalfundur eru lógligir og viðtøkuførir, tá ið lógliga er boðað til fundar.

Uppskot til lógarbroytingar skulu vera latin skrivstovu felagsins 6 vikur fyri aðalfundin.

Innkomin broytingaruppskot skulu vera latin hvørjum einstøkum limi saman við fráboðanini um aðalfundin. Til lógarbroytingar krevst, at minst 2/3 av møttu atkvøðunum á aðalfundi atkvøða fyri.

§ 10.

Er limagjaldið ikki goldið 14 dagar fyri aðalfundin, fellur atkvøðurætturin á aðalfundinum burtur. Um limagjaldið ikki er goldið í 2 fylgjandi ár, verður tað mett sum útmelding úr MáF.

Aðalfundurin hevur rætt til at strika lim, sum brýtur lógirnar og reglugerðirnar hjá MáF.

§ 11.

Loyvt er at stovna grunnar í MáF. Teir skulu tó hava til endamáls at fremja tey í 2. § nevndu endamál.

§ 12.

Loyvt er at stovna serbólkar í MáF. Hesir bólkar arbeiða við ábyrgd yvirfyri nevndini í MáF.

§ 13.

MáF skal við nevnd og starvsfólki virka sum millumlið og samskipari limanna millum og fremja samstarv teirra millum so væl sum gjørligt.

§ 14.

Til tess at avtaka MáF krevst, at 4/5 atkvøða fyri tí á aðalfundi. Nevndin skal kortini framvegis verða sitandi og skal boða til nýggjan aðalfund 4 til 6 mánaðir seinni. Verður tá aftur samtykt at taka felagið av við 4/5 í meiriluta, er felagið lógliga avtikið.

Ognir felagsins verða tá latnar landsstýrismanninum í mentamálum í varðveitslu og skulu tó framvegis bert verða nýttar til frama fyri áhugasjónleik í Føroyum.

Soleiðis broytt og samtykt á eykaaðalfundi í MáF 29. novembur 2006.

*Hilmar Joensen, formaður*

*Jógvan E. Ósá, næstformaður*

*Hjørdis Trónd, kassameistari*

*Eyð Matras, skrivari*

*Heðin Mortensen, nevndarlimur*